# Símun Samuelsen á landsliðnum



*Vágbingurin í Gøtu, Símun Samuelsen, er nýggjasti leikarin á landsliðnum. Hann hevur fingið boð til dystirnar ímóti Kasakstan seinni í mánaðinum*

**Millum teir 24, sum hava fingið landsliðsboð, eru fleiri ungir menn, og harvið verður staðfest, at ættarliðsskiftið heldur fram á landsliðnum**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Tað koma alt fleiri nýggj nøvn til sjóndar í landsliðshøpi. Í gjár vórðu spælararnir úttikinir, sum skulu umboða Føroyar, tá ið Kasakstan um eina stóra viku fer at spæla tveir landsdystir í Føroyum.

Henrik Larsen, landsliðsvenjari, hevur úttikið 24 spælarar. At talið er so stórt kemst av, at HB spælararnir og útisetarnir ikki vera tøkir til landsliðsfótbólt.

HB skal annan sunnudag spæla í Íslandi ímóti íslendska meistaraliðnum, og útisetarnir fara sama dag at vera upptiknir av landskappingardystum.

Útisetarnir og HB spælararnir koma tískil ikki til landið fyrrenn eftir fyrra dystin, sum verður á Svangaskarði sunnudagin 27. apríl klokkan 16. Úttøkan til seinna dystin, sum verður spældur á Tórsvølli týsdagin 29. apríl klokkan 18.45, verður ikki fyrrenn aftaná fyrra dystin.

### Nýggjasta skotið

Nýggjasti maðurin í landsliðshøpinum er Símun Samuelsen úr GÍ. Undan kappingarbyrjan flutti átjan ára gamli álopsspælarin úr VB og til GÍ. Nú verður hann mettur at vera so mikið góður, at hann hevur fingið landsliðsboð.

Ein veteranur, sum altíð hevur verið og framvegis er VB spælari, hevur eisini fingið landsliðsboð. Tað er VB málverjin Bjarni Johansen. Hann hevur ikki verið á landsliðnum í átta ár. Í steypakappingini hevur hann verið framúr væl upplagdur. Nú er hann aftur triði málverjin á landsliðnum, og tað er greitt, at hann í hvussu so er verður á beinkinum í fyrra dystinum ímóti Kasakstan.

### Ungu menninir

Umframt Símun Samuelsen eru fleiri aðrir ungir spælarar úttiknir. Jón Rói Jacobsen og Hjalgrím Elttør hava longu verið við fleiri ferðir, og teir mugu metast so at siga at vera sjálvskrivaðir í hópinum. Jan Ingi Petersen úr B68 var við á venjingarleguni fyrr á árinum. Hann hevur fingið boð, og tað hevur Atli Danielsen úr KÍ eisini. Súni Olsen úr GÍ var eisini við á venjingarleguni, og hann er við aftur.

Ingi Højsted úr Arsenal hevur verið nógv plágaður av skaðum. Hann er nú komin rættuliga fyri seg, og venjarin hevur sent boð eftir miðvallaranum at koma úr London og Highbury og á Svangaskarð og Tórsvøll at vísa, hvørjar knotur eru í honum.

Jonhard Frederiksberg av Skála hevur aftur hesa ferð fingið boð.

### Royndu spælararnir

Meiri tilkomnu landsliðsspælararnir, sum hava fngið boð, eru Jens Martin Knudsen, Hans Fróði Hansen, Fróði Benjaminsen, Jóhannes Joensen, Pól Thorsteinsson, Julian Johnson, John Petersen, Jákup Mikkelsen og Óli Johannsen.

Um ikki verður hugsað so nógv um aldurin, men heldur um tíðina og leiklutin, sum teir hava havt á landsliðnum, so eru hesir spælararnir úr næsta ættarliðnum úttiknir: Jákup á Borg, Andrew av Fløtum, Heðin á Lakjuni, Rógvi Jacobsen, Helgi L. Petersen og Christian Høgni Jacobsen.

Millum teir, sum hava verið nógv á landsliðnum, og sum ikki eru úttiknir hesa ferð, eru Jens Kristian Hansen og Øssur Hansen. Felags fyri teir báðar er, at teir eru skaddir.

B36 er best umboðað við fimm spælarum: John Petersen, Jákup á Borg, Julian Johnsson, Pól Thorsteinsson, og Heðin á Lakjuni. Næstbest umboðaða felagið er B68, sum eigur tríggjar spælarar – Fróði Benjaminsen, Hans Fróði Hansen og Jan Ingi Petersen.

So eru tað fleiri feløg, ið eiga tveir spælarar í 24 manna hópinum. Úr HB eru tað Rógvi Jacobsen og Andrew av Fløtum, úr NSÍ Jens Martin Knudsen og Helgi L. Petersen, úr KÍ Hjalgrím Elttør og Atli Danielsen og úr GÍ Súni Olsen og Símun Samuelsen.

Jónhard Frederiksberg umboðar Skála, Bjarni Johansen VB, Jóhannis Joensen, og FS Vágar. Einasta felagið í 1. deild, sum ikki eigur umboð í stóra hópinum, er EB/Streymur.

Útisetarnir hava ofta verið fleiri enn fimm. Men tað er einki óvæntað í, at teir ikki eru fleiri, tí tað eru fáirføroyingar, sum í løtuni spæla fótbólt uttanlands.

Landsliðið skal møta leygardagin 26. apríl klokkan 9.30.

## Drigið eftir páskirnar

LUTAKAST
*Páll Holm Johannesen*

Lutakastið til fjórðingsfinalurnar í kappingini um Løgmansteypið verður eftir páskirnar. Mannagongdin seinastu tvey árini hevur verið, at tað verður ikki avgjørt, fyrr enn bólkaspælið er av, hvørji feløg skulu hittast í fjórðingsfinalunum.

Tað er greitt, at vinnarnar í bólkunum, saman við besta tvey aranum fáa heimavøll í fjórðingsfinaluni. Møguleiki er eisini fyri, at feløg, sum hava verið í bólki saman, eisini kunnu hittast í fjórðingsfinaluni. Hetta hendi m.a. fyri tveimum árum síðan, tá KÍ og ÍF vóru í bólki saman, og lutakastið til fjórðingfinaluni eisini bólkaði tey saman.






skrivstovufólk søkist til eitt fulltíðarstarv
ella tvey hálvtíðarstarv

P/F SMS HEVUR VÍÐKAÐ VIRKSEMIÐ NÓGV SEINASTU TÍÐINA

...tí verður søkt eftir dugnaligum skrivstovufólki til vanligt skrivstovu- og bókhaldsarbeiði at byrja skjótast. Vit bíða tó fegin eftir rætta persóninum.

Royndir innan toll-avgreiðslu er ein fyrimunir, men eingin treyt.

Starvið er fulltíðarstarv, sum tó uttan trupulleikar kann lutast í tvey hálvtíðarstørv.

Lønar- og arbeiðstreytir verða avtalaðar millum partarnar.

Skrivligar umsóknir, sum verða viðgjørdar í trúnaði, skulu saman við neyðugum tilfari sendast til:

*P/F SMS*
*Postboks 1059*
*110 Tórshavn*
*Att.: Mary Husgaard, skrivstovuleiðari*

SMS

Tel.: (+298) 31 30 41 • e-mail: sms@sms.fo • www.sms.fo

petur & petur • 320870

SANSIR 355 355

# Starvsfólk til farmadeildina

**Søkt verður eftir starvsfólki til farmaavgreiðsluna og farmasøluna hjá Atlantic Airways á flogvøllinum.**

**Arbeiðið**
Starvsfólkið fer at virka í samstarvi við avgreiðsluna hjá Atlantic Airways á flogvøllinum í Vágum og hevur ábyrgdina av at:

· Avgreiða farm og selja farmaflutning
· Røkja farmakundar
· Avrokna farm
· Gera hagtøl og ansa eftir at sett mál verða rokkin

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir fólki, ið áður hevur fingist við at avgreiða farm. Tað er ein fyrimunir, um tú eisini hevur kunnleika til at avgreiða flogfør. Somuleiðis er tað ein fyrimunir, um tú hevur skeið í at handfara vandamiklan farm.

**Annars leggja vit stóran dent á:**
· Góð samstarvsevni og ágrýtni
· Sjálvstøðugt arbeiðslag
· Hugin at arbeiða ymsar tíðir á samdøgrinum.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn skal vera send Atlantic Airways í seinasta lagi 27. apríl 2003.

**Send umsóknina til:**
Atlantic Airways, 380 Sørvágur

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Pæturi Rasmussen á telefon 34 10 00 ella 21 37 60.

ATLANTIC AIRWAYS
**Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01**
**www.atlantic.fo**

**2. páskakvøld**
*discoteque*
*við DJ Petur*
BAROK






Um hóskandi boð fæst, er hesin snøggi chopparin, ein **Intruder 1400**, til sølu. Súkklan er góð at koyra, er kraftmikil og ógvuliga vøkur. Súkklan hevur bert koyrt 16 tkm og er sum spildurnýggj.

Myndir og nærri skrivilsi av súkkluni kann fáast við at ringja tlf. 212536, ella skriva ein teldupost til jakup_sandberg@hotmail.com

Møgulig fígging kann útvegast.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Húsaumsitingin**
hjá kommununi umsitur umleið 100 bygningar. Hesir eru, umframt 15 býlingshús og dagstovnar, skúlar, svimjihallir, fimleikahallir, læknahølir, leiguíbúðir, umsitingarbygningar og aðrir.

Tann, ið settur verður, kemur at røkja 3 býlingshús/dagstovnar.

www.torshavn.fo

# Húsavørður

Tórshavnar kommuna søkir eftir húsavørði til býlingshúsini.

**Arbeiðsuppgávur**
Umsøkjarin kemur m.a. at arbeiða við at:
- røkja bygningarnar og økið uttanum
- gera smærri umvælingar
- syrgja fyri at el, vatn, hiti og sanitetsviðurskiftini eru í lagi
- røkja ventilationina
- syrgja fyri at brunaviðurskiftini eru í lagi

**Kommunan roknar við at umsøkjarin**
- hevur handverkaraútbúgving sum timburmaður ella líknandi
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevnir
- hevur koyrikort

Umsøkjarin skal á skeið í skipaðum viðlíkahaldi av bygningum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett 15. mai 2003 ella skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eivind Danielsen, leiðara á húsaumsitingini, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 8. mai 2003. Viðmerk á brævbjálvan "Húsavørður".